## Vágadal aftur áhugaður í stjórastarvi



Manningin á Smyrli tekur als ikki undir við útsøgninum hjá Jan Haldansen, leiðara á sjódeildini hjá Manningin á Smyrli tekur ikki undir við útsagnunum hjá Jan Haldansen, leiðara á sjódeildini hjá Strandferðsluni, um at seta Regin Vágadal aftur í stjórastarvið. - Vit siglandi starvsfólk hjá Strandferðsluni taka uppá tað kraftigasta frástøðu frá hesum úttalilsi, tí vit eru hvørki hoyrd ella eftirspurd um málið, sigur manningin á Smyrli. Leiðarin á sjódeildini hjá Strandferdsluni, Jan Haldansen, heitti í gjár á landsstýrismannin um at seta Regin Vágadal aftur í starv. - Tað er Regin, sum er primos motor í strategiætlanini fyri, hvussu Strandferðslan kemur víðari. Hann hevur sett okkum í starv, liggur inni við vitanini um stovnin, og fyri okkum er tað øgiliga umráðandi, at hann kemur aftur, segði Jan Haldansen við Kringvarpið. Men hesum tekur manningin á Smyrli altso ikki undir við. Sjálvur sigur Regin Vágadal, at fekk hann bodid starvið aftur, hevði hann avgjørt umhugsað at tikið av. -Tað var eitt sera spennandi starv, sigur Regin Vágadal, sum fyri søkum tveimum vikum síðani bað um at verða loystur úr starvinum sum stjóri á Strandferdsluni.

# Hótta við at steingja Norðoyatunnilin

**Bygdaráðið í Leirvík noktar nú ferðsluni til og úr Norðoyatunlinum at koyra ígjøgnum Leirvík**



*Á nýggjárinum missa bilar, sum koyra ígjøgnum Norðoyatunnilin loyvi til at koyra ígjøgnum, Leirvík, men bygdaráðið í Leirvík noktar fyri at leinga loyvið. Tí er vandi fyri, at Norðoyatunnilin verður stongdur*

NORÐOYATUNNILIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er av álvara vandi fyri, at Norðoyatunnilin verður stongdur.

Tað er bygdarráðið í Leirvík, sum nú setir føtur í spenni og hóttir við at seta tiltøk í verk, sum í veruleikanum steingja tunnilin.

Tað ger bygdaráðið við eini hóttan um at nokta bilum til og úr tunlinum at koyra ígjøgnum Leirvíkar bygd.

Tá ið Norðoyatunnilin varð tikin í brúk, gav bygdaráðið í Leirvík fyribils loyvi til at binda í vegin hjá kommununi, so at bilar í og úr tunlinum kundi koyra ígjøgnum bygdina.

Loyvið er galdandi til á nýggjárinum í ár.

Sostatt gongur øll ferðsla til og úr Norðoyatunlinum ígjøgnum Leirvíkar bygd.

Tað hevur alla tíðina ligið í kortunum, at Løgtingið skuldi játta pening til ein nýggjan veg í ígjøgnum bygdina í sambandi við Norðoyatunnilin.

Men síðani er lítið og onki hent, tí tvídráttur hevur tikið seg upp um, hvussu og hvar, vegurin skal gerast.

Og ímeðan gongur taxametrið og nú á nýggjárinum gongur fyribils loyvið út hjá Norðoyatunlinum at binda í vegin í Leirvík.

Tað merkir, at bara um ein góðan mánað hevur Norðoyatunnilin ikki longur loyvi at lata bilar til og úr tunlinum koyra ígjøgnum Leirvík.

### Nokta at leingja loyvið

Tí hevur nevndin fyri Norðoyatunlinum søkt Leirvíkar Bygdaráð um at leingja fyribils loyvi, so at bilar til og úr Norðoyatunlinum framvegis kunnu koyra ígjøgnum Leirvík.

Umsóknin var fyri á bygdaráðsfundi í gjárkvøldið.

Og har samtykti bygdaráðið, at umsóknin verður ikki gingin á møti.

Bygdaráðið hevur eisini samtykt, at málið verður ikki tikið uppaftur, fyrrenn Løgtingið hevur endaliga avgreitt málið um vegaføringina ígjøgnum Leirvík.

Annars hevur Løgtingið samtykt at gera nýggjan veg til Norðoyartunnilin ígjøgnum Leirvík, har niðri í bygdini.

Men hetta er bygdaráðið ikki nøgt við og vil hava tann nýggja vegin omanfyri bygdina.

Samstundis hevur Kári P. Højgaard lagt uppskot fyri Løgtingið um at broyta ætlanina og at gera tann nýggja vegin omanfyri bygdina.

Og nú hevur bygdaráðið gjørt greitt, at spurningurin um at leingja fyribils loyvið til at lata ferðsluna í sambandi við tunnilin at koyra ígjøgnum bygdina, verður ikki tikin uppaftur, fyrrenn Løgtingið hevur tikið endaliga støðu til ætlanina at leggja vegin omanfyri ætlanina.

Tá ið endalig støða er tikin, er bygdaráðið í Leirvík sinnað at taka umsóknina upp aftur um at leingja fyribils loyvið til at lata ferðsluna í sambandi við Norðoyatunnilin sleppa at koyra ígjøgnum bygdina.

### Vilja hava málið avgreitt

Sostatt er greitt, at Leirvíkar bygdaráð hevur sett tumlaskrúvurnar á Løgtingið.

Loyvið at lata ferðsluna til og úr Norðoyatunlinum at koyra ígjøgnum Leirvík, gongur út longu á nýggjárinum og verður tað ikki framlongt, sleppa bilarnir ikki at koyra.

- Vit taka hetta stigið, tí nú vilja vit hava trygd fyri, at vegurin í sambandi við tunnilin verður gjørdur, sigur Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík.

Hon sigur, at nú hevur bygdaráðið í Leirvík livað við eini fyribils loysn meiri enn hálvtannað ár, tí so leingi er tað síðani, at Norðoyatunnilin læt upp.

Og nú vil bygdaráðið tryggja sær, at ein endalig loysn verður funnin.

Tí verður loyvið ikki longt fyribils, tí bygdaráðið sær tann vanda við sær, at onki hendir í málinum og so enda vit aftur í gomlu sjúkuni, at ein fyribilsloysn endar sum ein endalig loysn.

Borgarstjórin leggur afturat, at eitt er so tað, at bygdaráðið vil hava Løgtingið at leggja vegin omanfyri bygdina.

### Pengar skulu fylgja við

Men eitt annað er, at eftir uppskotinum til fíggjarlóg fyri næsta ár, er ætlanin bara at seta 10 milliónir av til tann nýggja vegin í Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin.

- Fyri 10 milliónir fæst ikki nógv av vegi, hvørki niðri í bygdini, ella omanfyri bygdina og eisini tað er ein stórur trupulleiki hjá bygdaráðnum.

Fríðgerð Heinesen sigur, at ein nýggjur vegur kostar einar 40-50 milliónir, sama um hann verður lagdur niðri í bygdina ella í erva.

- Og nú vilja vit hava trygd fyri eini endaligari loysn, tí sum støðan er nú, er tað púra óforsvarligt.

Hon vísir á, at har vegurin frá tunlinum verður bundin í Leirvíkarvegin, eru sjey ferðsluóhapp skrásett í ár.

- Vegurin nú er ein lappaloysn og tað vilja vit ikki góðtaka longur, leggur hon afturat.

Annars vónar hon sanniliga ikki, at tað kemur hartil, at tunnilin verður stongdur, tí loyvið at koyra ígjøgnum Leirvík ikki verður longt.

- Men tað stendur fult og heilt til Løgtingið, tí tað hevur nú ein gyltan møguleika at avgreiða málið endaliga, tí tað kostar tað sama at gera vegin í erva, sum bygdaráðið vil og at gera hann í neðra, sum Løgtingið áður hevur samtykt.

- Tí stendur tað fullkomiliga upp til Løgtingið, hvat skal henda á nýggjárinum, sigur Fríðgerð Heinesen.